ítróttur

Nr. 194 • hósdagur • 10. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Tveir tættir dystir avgera evsta plássið

Teir báðir dystirnir millum EB/Streym og B71, sum skulu gera av, hvat av liðunum kann kalla seg 1. deildarlið næsta ár, verða spældir sunnudagin og týsdagin

FÓTBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Bara ein hvíludagur verður millum teir báðar dystirnar millum sundalagsmenn og sandoyingar, tá EB/Streymur og B71 skulu gera av, hvat av liðunum næsta ár spælir í 1. deild.

Tann fyrri dysturin verður spældur sunnudagin á Eiði, og tann seinni longu aftur týsdagin á Sandi.

Hetta gjørdi fótbóltssambandið av við lutakasti fyrrapartin í gjár, tá tað eisini bleiv ásett, dómari í fyrra dystinum verður Lassin Isaksen og í seinna dystinum Oddmar Andreasen.

Bæði EB/Streymur og B71 hava ynskt at fingið spurningin um upp- ella niðurflyting avgreiddan sum skjótast, og tað er ein av orsøkunum til, at so tætt verður millum dystirnar báðar. Bara mánadagin fáa spælararnir at hvíla seg í.

Fyrst var talan um at spæla seinna dystin mikudagin, men tá spælir føroyska landsliðið móti Týsklandi, so helst hevði verið trupult at fingið mannað liðini og uppaftur verri at fingið nakrar áskoðarar, so tí verður spælt týsdagin í staðin.

Óvart á sundalagsmenn

At upp- og niðurflytingardystirnir skuldu verða spældir millum júst hesi bæði feløgini, var kanska ikki akkurát tað, tey flestu hevdu væntað.

Serliga mundi tað koma dátt við hjá EB/Streymi, at kappingin als ikki var liðug eftir tey átjan umførini, tí soleiðis sá ikki út tey fyrstu seytjan umførini. Liðið var ongantíð á aftasta plássinum, og frá áttanda umfarinum legði liðið sjógv millum seg og TB og Skála.

Men við einum øgiligum endaspurti - tríggjar sigrar í síðstu fýra dystunum - eydnaðist Skála fyrst at leggja TB aftur um seg, fyri síðani í allarsíðsta umfarinum eisini at taka EB/Streym.

- Eg skal ikki dylja fyri, at tað er øðrvísi, enn vit høvdu ætlað, at vit nú skulu spæla tveir dystir aftrat, eftir at kappingarárið annars er liðugt. Men tá málið hjá okkum var at halda okkum í 1. deild, og vit nú skulu spæla tveir dystir aftrat fyri at røkka tí málinum, so gera vit tað, sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá EB/Streymi.

- Lagið hevur verið gott undir venjingini hesa vikuna, so eg haldi at allir eru greiðir yvir, at hetta mugu vit bara taka við. So vit fara eftir at vinna dystirnar, so vit framvegis teljast millum 1. deildarliðini næsta ár.

B71 væntaði Skála

Sandoyingar høvdu hinvegin í eina góða viku vitað av, at teir skuldu spæla hesar báðar dystirnar, eftir at kappingin í 2. deild annars var liðug. Og undan tí hava teir ligið væl fyri at fara við næstfremsta plássinum aftan fyri FS Vágar, ið vann deildina suverent.

Kappingin í næstbestu deildini hevur annars verið rættiliga fløkt, tí ikki fyrr enn móti endanum gjørdist eitt sindur av muni á teimum, ið kundu flyta niður og teimum, ið kundu vinna silvur og rætt til uppflytingardyst.

- Hóast vit høvdu væntað, at vit skuldu spæla móti Skála, so kann tað í grundini gera tað sama, um tað verður EB/Streymur í staðin. Vit vita, at eitt 1. deildarlið eigur at vera væl fyri, og so kann tað gera tað sama, hvussu tað eitur, sigur Eli Hentze, spælandi formaður í B71.

- Eg havi havt varhugan av, at EB/Streymur hevur verið eitt støðugari lið enn Skála, men hinvegin skerst ikki burtur, at Skála hevur víst rættan form síðstu dystirnar.

Hetta er annað árið á rað, at B71 er við í teimum báðum dystunum, ið skulu gera av, hvør fær evsta sessin í 1. deild, men munurin er kortini tann, at í fjør var tað B71, sum tapti og flutti niður. Nú kann liðið vinna og flyta upp.

Tá vóru tað skálamenn, sum í fyrra dystinum á Sandi mestsum avgjørdu alt við einum 4-1 sigri. Vikuna eftir vann B71 1-0 á Skála, men tað munaði ov lítið í samanlagda úrslitinum.

Nú fæst so at síggja, um sandoyingarnir duga betur at spæla seg uppeftir, ella um sundalagsmenn megna at halda fast um sítt pláss í bestu deildini.

Fyri einum ári síðani taptu Eli Hentze og B71 móti Skála og fluttu niður. Nú skulu sandoyingar vinna á EB/Streymi fyri at flyta upp

Jákup Bogi dugdi best at gita

Nú landskappingin í 1. deild er av, er áhugavert at hyggja at, hvussu teir ymsu ítróttartíðindamenni nir undan kappingini gittu um, hvussu endaliga støðan fór at vera

FÓTBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Onkur vil kanska halda, at ítróttartíðindamenninir eru teir, ið halda seg vita alt. Men tá tað kemur til at síggja fram í tíðina í føroyskum mansfótbólti, eru evnini ymisk.

Í serblaðnum »Fótbóltur 2002«, sum Sosialurin gav út í vár, áðrenn landskappingin byrjaði, blivu fimm av tíðindamonnunum bidnir um at gita, hvussu kappingin fór at enda. Og - sum vant - var misjavnt, hvussu væl ella illa teir raktu.

Nógv tað frægasta úrslitið átti ítróttarskrivarin á Dimmalætting, Jákup Bogi Joensen, ið hevði meistaraliðið HB og so tey fimm aftastu liðini rætt. Á plássunum frá nummar tvey til fimm fór raðfylgjan hjá honum tó av lagi.

Men yvirhøvur at gita røttu endaplaseringarnar hjá seks av teimum tíggju liðunum er framúr gott, so Jákup Bogi skal hava rós fyri tað. Lagaðu bara nøkur fá ting seg eitt sindur øðrvísi, hevði hann havt alt rætt…

Meira og minni skeivt

Á einum deildum næstfremsta plássi í hesari lítlu »miðlakappingini« komu so útvarpsmaðurin Suni Merkistein og okkara egni Jákup Mørk, ið hvør høvdu fýra lið rætt í endaligu støðuni.

Suni gitti fýra tey niðastu, men fór so skeivur í ovara endanum, meðan Jákup fekk trý tey niðastu rætt og so GÍ á fjórðaplássinum. Suni hevði B36 sum besta meistaraboðið og Jákup satsaði upp á KÍ.

Sjónvarpsmaðurin Tórður Mikkelsen og ítróttarskrivarin hjá Oyggjatíðindum, Finnur Helmsdal, mugu finna seg í einum deildum aftasta plássi, og báðir høvdu teir trý av teimum tíggju liðunum á røttum stað.

Finnur gitt trý tey niðastu, men hevði síðani einki annað rætt. Eins og Suni trúði hann mest upp á B36 sum meistaralið og HB sum silvurvinnara, men soleiðis endaði tað heila als ikki, tá samanum kom.

Tórður kann hinvegin iðra seg um, at føroyska kappingin ikki bara er seytjan umfør, tí so hevði hann fingið fimm rætt. Hann hevði meistaraliðið HB á rætta plássinum, VB sum nummar sjey og TB sum aftasta liðið, men so satsaði hann uppá, at EB/Streymur fór at halda plássið oman fyri Skála.

Kenna botnin best

Yvirhøvur vísir tað seg, at ítróttartíðindamenninir duga best at gita um, hvør endar aftarlaga, tí fýra av teimum fimm gittu, hvørji lið blivu trý tey niðastu. Tveir høvdu meistaraliðið rætt, men annars var eingin - uttan Jákup Bogi - ordiliga í nánd av at gita, hvussu seks ella sjey tey ovastu fóru at liggja, tá tey átjan landskapp-ingarumførini vóru av.

Eingin hevði heldur roknað út, hvørji lið fóru at finnast millum heiðursmerkjamóttakararnar, men kortini var Jákup Bogi eisini nærmastur har, tí hann gitti HB, KÍ og B36, meðan Finnur Helmsdal gitti B36, HB og NSÍ.

Og fyri at venda aftur til byrjanina, at fleiri kanska vilja halda, at ítróttartíðindamenninir eru teir, ið halda seg vita alt, so hevði tað kanska verið eitt hugskot at fingið almenningin at gitt við næstu ferð.

Tað kundi jú saktans hent, at onkur visti betur enn teir, ið onkur heldur halda seg vita alt…

Jákup heldur fram í Molde

Felagið vil ikki av við føroyska málverjan, sum kennir seg væl fyri at taka uppgávuna á seg at verja málið í landsdystunum komandi vikuna

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Søgurnar hava verið nógvar síðstu vikuna. Sunnukvøldið endurtók Jákup Mikkelsen tað í útvarpinum, sum hann segði, tá hann fyrst í september var heima í sambandi við landsdystin ímóti Skotlandi. Hann ynskti at sleppa burtur úr Molde, tí hann ikki fær møguleikan á besta liðnum.

Í Klaksvík hevur verið nógv tos um, at Jákup Mikkelsen skuldi vera spælandi venjari hjá KÍ, og møguleikin fyri, at málverjin skuldi flyta til okkurt annað útlendskt felag hevur eisini verið nevndur. Men nú er veruleikin tann, at Jákup Mikkelsen verður í Molde.

- Eitt ár er eftir av sáttmálaskeiðnum. Eg havi spurt meg fyri, um tað var møguligt at sleppa leysur nú, men venjarin, Gunde Bengtsson, hevur verið avgjørdur í, at teir hava brúk fyri mær, so vit fara ongan veg.

Ert tú vónbrotin ikki at sleppa burtur?

- Tað kann vendast báðar vegir. Tað er ikki nøktandi hjá mær ikki at spæla á besta liðnum. Tí hevði tað verið gott at sloppið burtur. Men á hinari síðuni havi eg í vikuni fingið greiða ábending um, at teir rokna meg framvegis at vera gott boð upp á málverjuplássið á liðnum í tippuliguni, og útmeldingin hjá teimum ger ikki hugin minni at stríðast fyri plássinum, sigur Jákup Mikkelsen.

Væl fyri

Jákup Mikkelsen varð avsettur landsliðnum til dystin ímóti Skotlandi. Tað var hann sjálvandi vónbrotin av. Nú standa tveir týdningarmiklir útdystir fyri framman, og Jákup sigur seg vera væl fyri at spæla - um hann fær møguleikan:

- Eg venji fjúrtan tímar á grasi um vikuna. Tað er mítt arbeiði, og eg haldi ikki, at eg havi verið betri fyri enn tað sama. Eg spæli eina ferð um vikuna. Í 2. deild eru vit á fimta plássi. Viðhvørt vinna vit stórt, og aðrar ferðir stendur tað nógv á. Eg kenni meg vera topptrimmaðan til stóru avbjóðingarnar í Litavia og Týskalandi, og sjálvandi eri eg við á ferðini, tí eg vóni at sleppa at spæla. Men eg eri ikki harri yvir, um tað verður Jens Martin ella tað verði eg, sum fari at verja málið. Avgerðin er hjá venjaranum. Men eingin ivi skal vera um, at eg eri uppsettur og klárur til avbjóðingina, sigur Jákup Mikkelsen.

Jákup Mikkelsen sleppur ongan veg úr Molde, tí venjarin sigur brúk vera fyri honum har

Myrka ferðin er ikki altíð soltin

Hagtølini eru ikki eintýðug, tá tað ræður um úrslitini á landsliðsferðini eftir at landskappingin er av

LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Fyrrapartin í gjár klokkan tíggju fór fótbóltslandsliðið á síðstu uttanlandsferðina í hesum árinum. Tveir dystir eru á skránni á ferðini. Tann fyrri verður í Litavia seinnapartin leygardagin, og tann seinni verður í Týskalandi mikukvøldið í komandi viku. Talan er bara um aðru uttanlandsferðina hjá landsliðnum í ár. Hin fyrra var í februar, tá landsliðið var á venjingarlegu á Kypros. Tá vóru tveir dystir á skránni. Landsliðið tapti 2-1 ímóti Póllandi, og liðið vann 1-0 ímóti Liktinstein.

Síðani tá hevur landsliðið á heimavølli vunnið 3-1 ímóti Liktinstein og spælt 2-2 ímóti Skotlandi í fyrsta EM undankappingardystinum í hesum umfarinum.

Tveir sigrar, ein javnleikur og eitt tap og málmunurin 7-5 er óhoyrd úrtøka hjá føroyska landsliðnum. Spurningurin er so, hvussu tað fer at standa til, tá landsliðið hósmorgunin í komandi viku verður aftur í Føroyum.

Hagtølini

Í fyrradagin segði Jákup Mikkelsen seg stúra eitt sindur fyri, um spælararnir fóru at verða nóg væl tunaðir inn á stóru uppgávuna. Tað gjørdi hann, tí nú luttaka nógv teir flestu spælararnir á landsliðnum í føroysku kappingini, sum er liðugt spæld. At kappingin er liðug kann hava við sær, at sinniliga yvirskotið, sum spælararnir høvdu verið noyddir at hildið seg til, um fleiri umfør vóru eftir í landskappingini, kann vera burtur, tá alt er avgjørt. Málverjin undirstrikaði, at tað skal so ógvuliga lítið til, áðrenn tað á hesum støðinum sæst væl og virðiliga aftur í hugburðinum, avrikunum og harvið úrslitunum.

Jákup Mikkelsen mundi ikki minst hava dystin í Sveis fyri tveimum árum síðani í huga. Landskappingin var liðugt spæld, tá landsliðið fór til Sveis. Føroyar løgdu seg framum 1-0 beinanvegin, men sveisararnir so hølvaðu føroyingarnar av. Úrslitið varð 5-1. Sambært skránni skuldi føroyska liðið fýra dagar seinni spælt í Beograd, men dysturin varð útsettur orsaka av fløktu støðuni í Jugoslavia. Avrikið í Sveis boðaði ikki frá góðum í Jugoslavia - í so máta var tað bara gott, at dysturin varð útsettur. Dysturin varð spældur í august árið eftir, og tá var úrslitið 2-0 til heimaliðið.

Men hagtølini eru ikki altíð so ljót fyri landsdystirnar, sum verða spældir í oktober.

Í fjør taptu Føroyar 3-0 í oktober í Slovenia. Í 1999 taptu Føroyar í minniliga dystinum í Prag. Ta ferðina var talan um sera gott avrik.

Bestu avrikini í oktober á útivølli vóru tey í 1998. Ta ferðina vóru Føroyar í Litavia og í Skotlandi. Dysturin ímóti somu tjóðini, sum Føroyar skulu spæla ímóti leygardagin, Litavia, var málleysur javnleikur, og í Aberdeen endaði tað 2-1 til skotska heimaliðið. Føroyingar vóru niðurspældir fyrra partin av fyrra umfarinum í Litavia, men teir fótaðu sær, og í Aberdeen gekk tað upp á stás. Orkan var so mikið nógv, at Føroyar síðstu minuttirnar trýstu meiri fyri at javna, enn skotarnir trýstu fyri at økja um leiðsluna.

Øðrvísi veruleiki

Omanfyri standandi kundi boðað frá, at tað oftast gongst væl á heystartúrinum, og tað hevði verið framúr, um tað hesa ferð royndist væl betri, enn tað gjørdi í marrudystinum í Sveis.

Men tað er ein munur á liðnum, sum nú er farið á myrku heystarferðina, og á liðnum, sum í 1998 og í 1999 stóð seg so væl í Litavia, Skotlandi og Kekkia. Tær ferðirnar vóru fleiri spælarar á liðnum, sum vóru í útlendskum kappingum - í Danmark, Noregi, Íslandi og Onglandi. Hesa ferð eru allir spælararnir uttan Jákup Mikkelsen og Christian Høgni Jacobsen farnir í vetrarfri frá landskappingini. Tí er vandin kanska størri fyri tí, sum Jákup Mikkelsen kvígur fyri, enn hann var fyri trimum og fýra árum síðani.

Á hinari síðuni kunnu vit siga, at føroysku spælararnir vita væl og virðiliga, hvat tað snýr seg um. Nógv teir flestu teirra hava verið á sovornum ferðum undanfarnu árini, og teir, sum vóru við í Sveis í fyrraárið, eiga at minnast til, hvussu tað ikki skal gerast.

Allir teir, sum næstsíðsta týsdag fingu ferðaboð, eru við í Litavia. Christian Høgni Jacobsen og venjarin, Henrik Larsen, ferðaðust umvegis Keypmannahavn, Jákup Mikkelsen ferðaðist umvegis Oslo, og hinir lættu allir fyrrapartin í gjár við flogfarinum hjá Atlantsflog úr Vágum.

FK-kappingin um vikuskiftið

FLOGBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Fimm lið hjá kvinnum og seks hjá monnum eru við í FK-kappingini fyri meistaradeildarlið, sum verður høvuðsstaðnum um vikuskiftið. Mannfólkini spæla í Hoyvíkshøllini og konufólkini í Gundadalshøllini, og byrjað verður leygarmorgunin klokkan 9.30 stundisliga.

Hetta er fyrsta flogbóltskappingin millum tey bestu liðini í vetur, og plagar hon at geva ábendingar um, hvør fer at standa seg væl ella ikki í sjálvari landskappingini, sum byrjar í næstum. Men meira er upp á spæl enn bara tað.

Samstundis sum FK-kappingin er inngangurin til veturin hjá flogbóltsfólkinum, er hetta avgjørt ikki bara ein »upphitingarkapping«, tí vinnararnir hjá kvinnum og monnum spæla seg beinleiðis í steypafinalurnar, ið verða spældar 15. februar 2003.

Hjá kvinnunum eru liðini seks í tali - TB, Mjølnir, Dráttur, ÍF, Fleyr og KÍF - og spælt verður í tveimum bólkum: Í bólki A eru TB, ÍF og Fleyr, og í bólki B Mjølnir, Dráttur og KÍF.

Dystirnir í bólki A eru ÍF-Fleyr, TB-ÍF og TB-Fleyr, og í bólki B Dráttur-KÍF, Mjølnir-Dráttur og Mjølnir-KÍF.

Í aðrari hálvfinaluni spælir vinnarin í bólki A móti nummar tvey í bólki B, og í hinari spælir vinnarin í bólki B móti nummar tvey í bólki A. Finalan hjá kvinnunum verður spæld sunnudagin klokkan 13.30.

Hjá monnunum eru liðini Fram, Fleyr, SÍ, ÍF og Mjølnir, og spæla tey øll í einum bólki á tveimum vøllum samstundis.

Dystirnir eru Fleyr-Mjølnir og SÍ-ÍF, Fram-Fleyr og Mjølnir-SÍ, Fram-ÍF og Fleyr-SÍ, ÍF-Mjølnir og SÍ-Fram, ÍF-Fleyr og Mjølnir-Fram.

Tey bæði liðini, ið eru fremst eftir allar hesar dystirnar, spæla finalu sunnudagin klokkan 15.